**Úr grannalondum**

*Lagt til rættis: Árni Joensen*

## Besti ikki bestur longur

Á seinasta kommunuvali í Íslandi hildu nógvir veljarar, at best mundi vera at velja Besta Flokkin, og flokkurin gjørdist eisini tann stóri sigursharrin við 35 prosentum av atkvøðunum.

Men sambært einari nýggjari kanning eru tað ikki so mong, sum halda Besta Flokkin vera tann besta longur. Hevði val verið nú, hevði flokkurin fingið 19 prosent av atkvøðunum og hevði mist helvtina av sínum kommunustýrislimum, sigur RÚV.

## Eingin royking!




Støðugt fleiri danskir arbeiðsgevarar nokta sínum starvsfólki at roykja á arbeiðsplássinum. Boðini eru heilt einfalt, at fólk skulu bíða við at festa sær í, til tey koma til hús.

Hjá Kræftens Bekæmpelse eru tey fegin um gongdina.

– Fyrr var tað púra óhoyrt at tosa um at banna royking. Men nú síggja vit, at støðugt fleiri og serliga almennir arbeiðsgevarar siga við fólk, at royking hoyrir til privatlívið, sigur Inge Haunstrup Clemmensen, sum er yvirlækni hjá felagsskapinum, við DR.

## Til Noregs vit fara

Áttandi hvør arbeiðstakari í Noregi er útlendingur, og sambært einari meting hjá Norges Bank koma metnógvir útlendingar til Noregs at arbeiða tey næstu trý árini.

Tølini vísa, at um ársskiftið 2009-2010 arbeiddu 326.000 útlendingar í Noregi. Tað vil siga, at 13 prosent av arbeiðsmegini vóru útlendingar,og tað er tvær ferðir so nógv sum fyri átta árum síðani.

Norges Bank sigur, at gongdin fer at halda fram, og at vøksturin fer at seta nýtt met á hvørjum ári til 2014.

# Ikki tað besta at keypa fisk í Føroyum

**Norðmenn liggja framvið, nú minni av íslendskum fiski kemur á marklnaðin í Grimsby**




Bretska kringvarpið BBC sigur, at tann álvarssama fíggjarkreppan í Íslandi hevur havt við sær, at munandi minni av íslendskum fiski kemur á marknaðin í Grimsby nú enn fyrr. Ein onnur orsøk er, at íslendingar hava valt at virka ein størri part av fiskinum í Íslandi.

BBC veit eisini at siga, at norðmenn ætla sær at fáa vinning av, at minni fiskur kemur úr Íslandi, og í næstum kemur ein norsk sendinevnd til Grimsby at tosa um at flyta meiri norskan fisk á marknaðin har.

Ein av fiskaseljarunum í Grimsby, Andy Fyche, sigur við BBC, at nú minni fiskur kemur úr Íslandi, hava hann og felagar hansara verið noyddir at keypa fisk í Føroyum og Noregi. Men tað er ikki tað besta, sigur hann, tí tá síggja teir ikki fiskin, áðrenn teir keypa hann. Kemur fiskurin haraftur-ímóti á marknaðin í Grimsby, kunnu teir hyggja at fiskinum, áðrenn teir keypa, sigur Andy Fyche við BBC.

# Danir brúka ov lítið av pengum




*Danir spara so nógv, at tað tálmar vøkstrinum í samfelagnum*

**Tey seinastu árini hava danir verið so sparnir, at eftir bara fáum árum er uppsparingin tvífaldað. Men tað er ikki bara gott**

Tað kann vera skilagott at spara, men vandi er í hvørjari vælferð, og nú ávara danskir búskaparfrøðingar um, at tann stóri sparihugurin kann steðga vøkstrinum í samfelagnum.

Tøl, sum Danske Bank hevur gjørt upp, vísa, at síðani fíggjarkreppan byrjaði í 2007, hava danir tvífaldað sína uppsparing. Í meðal leggur hvørt húski 34.000 krónur til viks um árið, og tilsamans gevur tað 86,5 milliardir krónur.

Samstundis stendur tann privata nýtslan í stað, og við verandi gongd er vandi fyri, at Danmark kann koma í somu støðu sum Japan, har ovurstórur sparihugur millum fólk hevur steðga vøkstrinum í búskapinum.

Stjórin í danska Tjóðbankanum, Niels Bernstein, sigur við Berlingske Tidende, at tann privara nýtslan er søguliga lítil. Sambært tølunum er nýtslan fýra prosent minni, enn hon var, áðrenn kreppan tók seg upp á heysti í 2007.